LM-004/2023

TRYGD

P/F Trygd
Tryggingarfelag
Húsagøta 3
Postboks 44
FO-110 Tórshavn

Telefon +298 358 100
Telefax +298 317 211
trygd@trygd.fo
www.trygd.fo

Til Umhvørvismálaráðið
Gongin 7
FO 100 Tórshavn

Dagf. 30.05.2023

Viðv. Uppskot til løgtingslóg um broyting í Arbeiðsskaðatryggingarlógini

Víst verður til skriv, dagfest 2. mai 2023, har Umhvørvismálaráðið hevur sent Trygd løgtingslógaruppskot til ummælis.

P/F Trygd skal við hesum seta fram ummæli til *Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygging móti avleiðingum av arbeiðsskaða (Arbeiðsskaðatryggingarlógin) (Javning av framhaldandi árligari veiting av endurgjaldi fyri mist vinnuføri, og áseting um, at endurgjaldsveiting í seinasta lagi endar við fólkapensjónsaldur)*. Trygd viðurkennir endamálið við løgtingslógaruppskotinum, ið tryggjar eina rættvísa veiting til tann tryggjaða í tráð við bæði galdandi pensjónsaldur og lønarlagið í samfelagnum. Trygd hevur fylgjandi viðmerkingar og viðmælir til uppskotið:

Viðmerkingar

Ad § 66.

Í galdandi orðing verður í § 66, seinna broti, nevnt um veiting fyri miss av uppihaldara, at "*Sama er galdandi, um viðkomandi longu er fyltur 67 ár, tá tryggjaði læt lív orsakað av arbeiðsskaðanum ella av vinnusjúkuni sbrt. § 10, stk. 1."* meðan tað í uppskotinum til nýggju orðingina verður broytt til *"Sama er galdandi, um viðkomandi, ið hevur rætt til veitingina, longu hevði rætt til fólkapensjón, tá tryggjaði læt lív orsakað av arbeiðsskaðanum ella av vinnusjúkuni sbrt. § 10, stk. 1."*

Við nýggju orðingini verður *rættur til fólkapensjón* nýtt ístaðin fyri ein ávísan aldur (67 ár), og orðingin "fólkapensjónsaldur sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a.", sum annars verður brúkt aðrastaðnis í løgtingslógaruppskotinum gongur ikki aftur. Tá ið rætturin til fólkapensjón fevnir um onnur viðurskifti enn bert aldur hjá tí tryggjaða, kann nýggja orðingin í seinna broti í § 66 elva til misskiljing. Trygd viðmælir tí, at "fólkapensjónsaldur sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a." verður nýtt í báðum brotunum í § 66.

Ad § 50 og § 66

Eftir galdandi orðingum verður við § 50 og § 66 veitt eitt endaligt endurgjald, ið svarar til 2 ferðir ta árligu endurgjaldsveitingina. Trygd metir, at galdandi orðing við endaliga endurgjaldinum longu leggur upp fyri, at tryggjaði, í eitt tíðarskeið, hvørki hevur rætt til arbeiðsskaðatrygging ella fólkapensjón. Eins og endaliga veitingin er strikað í donsku *Lov om arbejdsskadesikring*, viðmælir Trygd tí at endaliga veitingin verður strikað, tá løgtingslógaruppskotið við broytingunum viðvíkjandi fólkapensjónsaldrinum nú forðar fyri, at slík støða, har tryggjaði hvørki fær arbeiðsskaðatrygging ella fólkapensjón, tekur seg upp.

TRYGD

Ad Avleiðingar fyri vinnuna

Í 2. kapitli í løgtingslógaruppskotinum verður um avleiðingar fyri vinnuna nevnt, at uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri tryggingarfeløgini, sum skulu rinda meira út í endurgjøldum, og at tryggingargjøld tí fara at hækka. Trygd tekur undir við mettu avleiðingunum, men ynskir at leggja afturat, at broytingin, umframt hækkandi endurgjøld, fer at merkja meirkostnað í sambandi við umsiting, tá tryggingarmál við uppskotinum koma at verða undir viðgerð í longri tíðarskeið enn áður.

Umframt omanfyri nevndu viðmerkingar, ynskir Trygd at nýta høvi at vísa til onnur økið í galdandi lóggávu, ið áttu at verið eftirhugt og broytt í sama umgangi:

Ad Mótrokning í sambandi við vard størv

Við galdandi lóggávu er við ásetan av endurgjaldinum fyri mist vinnuføri ongin heimild at mótrokna møguliga inntøku frá vardum starvið, ið tryggjaði er settur í eftir arbeiðsskaðan. Um tann tryggjaði verður settur í vart starv eftir arbeiðsskaðan, kann tað í summum førum merkja, at inntøkan hjá tí tryggjaða er hægri enn undan arbeiðsskaðan. Trygd mælir tí til, at galdandi lóg verður broytt hesum viðvíkjandi. Víst verður til § 17a í donsku *Lov om arbejdsskadesikring*, har slík heimild longu er galdandi.

Ad Freistir Vanlukkutryggingarráðsins

Fyri at tryggja felags fatan og gjøgnumskygni í málsviðgerðini av einum arbeiðsskaðatryggingarmáli, viðmælir Trygd at galdandi § 29 verður broytt soleiðis, at ítøkilig freist verður sett fyri nær niðurstøða um endurgjaldsveiting fyri viðurkendan arbeiðsskaða skal fyriliggja, saman við kravi um skrivliga kunning og grundgeving frá Vanlukkutryggingarráðnum fyri, um ásetta freistin ikki kann haldast. Við slíkari freist og kunningarskyldu, verður tryggjað at tryggingarfeløgini fáa fyrihildið seg til gongdina í málsviðgerðini. Til íblástur verður víst til § 16 í donsku *Lov om arbejdsskadesikring.*

Vegna P/F Trygd,

Brian Snedegmark

Stjóri